handVERKARIN

BLAÐ NR. 49

HAVNAR HANDVERKARAFELAG

LIMIRNIR VÆL TRYGGJAÐIR

Eftir at nýggj eftirlønarlóg er sett í gildið, sum letur upp fyri møguleika, at brúka part av eftirlønarinngjaldinum til at keypa tryggingar fyri og, at vit 1. januar 2014 fingu nýggja tryggingaravtalu við Betri Pensjón, hevur nevndin umrøtt henda møguleika. Á ársaðalfundinum seinast var nakað av kjaki um evni, bæði fyri og ímóti. Semja var um at kalla inn til eykaaðalfund, at viðgera máli. Eykaaðalfundur har málið var viðgjørt, varð hildin í hølum felagsins tann 14. mai.

Niðurstøðan á eykaaðalfundinum var greið. Breið undirtøka var fyri, at vit framyvir skula brúka part av eftirlønargjaldinum til at keypa tryggingar fyri. Eisini var samtykt, at limagjaldið verður sett niður í 390,- um mánaðin.

Tað kann tykjast eitt sindur løgi, at vit nú á ein hátt hava hálsa um hvat eftirlønini viðvíkur. Vit hava altíð meint, at eftirlønin skal fara óskerd í grunnin og, at tryggingar skula haldast uttanfyri. Men tað er eingin loyna, at kunngerðin um nýggja eftirlønarlóg hevur fingið okkum at broyta hugsan. Sum fyrr sagt ætla okkara myndugleikar, at tað vit í framtíðini gjalda inn og, sum er skattað skal gjaldast út eftir einum leisti, sum teir áseta og eisini eru ásetingar um, hvat hendir við útgjaldspartinum um ein doyr. Har stendur beinleiðis, at um ein t.d. doyr eftir náddan eftirlønaraldur, 67 ár ella eldri, fellur ein stórur partur av samansparingini í stóra pott. Hetta má í mildasta føri metast at vera ognartøka og ein eyka skattur, sum lagdur verður á ein part av Føroya fólki, nevniliga tey, sum eru so óheldig at doyggja áðrenn tíð. Tí meta vit, at meira fast burturúr, um vit nýta henda hátt til at tryggja okkara limir. Sum eg fyrr havi sagt, haldi eg tað verða óhugnaligt, at vit hava eina so karr ráða samgongu, sum ikki bakkar fyri at gera seg inn á ognir hjá meiniga borgaranum. Ásetingin í kunngerðini kann illa tulkast á annan hátt. Tíðin kemur nokk at vísa, um henda framferð er ósambærilig við lógina.

Framhald á bls. 13

Í blaðnum hesa ferð: **síða**

Oddagrein . . . . . s. 2
Sveinastykkið hjá Hartvig Hansen . . . . . s. 3
Sjónarhornið . . . . . s. 8
Eli Brimsvík: Formansfrágreiðing fyri árið 2013 . . . . . s. 12
Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelag: Formansrøða á aðalfundi . . . . . s. 24
Samandráttur av ársfrásøgn 2013 . . . . . s. 34

Útgevari: Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík
Blaðstjórn: Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Skrivstovutíð: Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverkarin@handverk.fo · www.handverk.fo

SVEINASTYKKIÐ HJÁ HARTVIG HANSEN

Hartvig Alexander Hansen var føddur í København 28. juni 1902. Foreldrini vóru Anders Hansen og Johanna Maria Skylv Hansen. Tá ið pápin, sum var danskari, fekk starv við vitan í Akrabergi, flutti familjan heim til Føroya í 1912.

Hartvig Hansen, snikkarameistari

Hartvig var fermdur í Vágs kirkju í 1916, og var hann fyrsti konfirmantur í føroyskum búna. Longu árið eftir fór hann til Frederikssund at læra til møbilsnikkara hjá Peder Andersen, sum eisini var systkinabarn hansara. Hann var útlærdur í 1922 og fekk silvur fyri sveinastykkið sítt. Sum so mangur unglingi hevði hann ikki nóg mikið av peningi at gjalda fyri sveinastykkið, sum tí varð verandi hjá meistaranum og seinni ogn hjá Edel Henriksen, dóttir Peder Andersen. Nýútlærdur fór Hartvig til Týsklands, har hann arbeiddi sum „navari“ ella „vandrende svend“. Um tað mundið vóru sera ringar tíðir, og inflatiónin var ógvuliga høg. Hann hevði á orði, at hann kundi vera millióningur í ein dag, og at best var at nýta lønina sum skjótast, tí ikki var vist, at pengarnir høvdu nakað virði næsta dag.

Fyrst í 30'unum kom Hartvig heim til Føroya. Foreldrini búðu tá í Mykineshólmi. Tey vóru flutt út hagar í 1924 og vóru har í seytj-

Sveinastykkið hjá Hartvig Hansen. Hann var útlærdur møbilsnikkari í 1922.

an ár. Anders var vitameistari, og nú børnini øll vóru farin heiman, fann Johanna Maria stundir at lesa nógv, og hon byrjaði at skriva. Fyrsta bók hennara Gamla Gøtur I kom út í 1950. Hartvig flutti inn hjá mostrini, Katrina, sum átti og rak Hotel Djurhuus, í dag kallað Áarstova. Hann keypti múrarnar, sum vóru ætlaðir til ein bygning, ið skuldi vera landsbanki. Í dag hýsir bygningurin Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla. Í frítíðini arbeiddi hann upp á húsini hjá sær, og í september 1933 var klárt, og tá byrjaði hann sítt egna snikkaravirki í J. H. Schrøtersgøtu 1.

Hartvig og Sára Hansen giftust 7.februar 1948. Tey fingu fýra børn, Elna, Ragna, Marna og Skylv. Hartvig doyði 2.desembur 1963, og kona hansara førdi snikkaravirkið víðari. Sára doyði 16.februar 1973. Øll árini var samband við Peder Andersen um jóltíðir, og hetta sambandið hevur hildið fram millum Marnu og Edel, dóttir Peder, seinni.

Sveinastykkið hjá Hartvig Hansen, sum hevur staðið í Danmark og verið ogn hjá familjuni hjá lærumeistaranum, er nú komið heim til Føroya – 90 ár eftir at tað var smíðað – og í dag stendur tað í heiminum hjá dóttrini Marnu Skylv Sørensen.

14.10.2013

ESH

Ragna Skylv Reinert

Mong undrast, at lærlingur kundi gera eitt so einastandandi sveinastykki, tá ongar maskinur vóru at taka til. Á myndunum niðanfyri síggja vit, hvussu framúrskarandi smálutirnir eru framdir.

Ídnaðar- og garaguhurðar

Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

rør-tænastan

v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80

Vatn•Hiti•Sanitet•Ventilatión

Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

Vit bjóða m.a.

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)

MEST

MEST
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Linde Gas

AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass

Upplatingartíðir :
mána, -friggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo

www.gassola.fo

SJÓNARHORNIÐ: TÓRBJØRN LÁADAL

Tórbjørn Láadal húsavørður í fíggjarmálaráðnum.

Børn:
Heidi, Jóhannus og Ejler

Núverandi starv:
Húsavørður í Fíggjarmálaráðnum

Útbúgving:
Málari. Havi arbeitt í 25 ár sum gólváleggjari, tað var áðrenn eg byrjaði á Fíggjarmálaráðnum, har eg havi verðið í 12 ár.

Læra byrjað:
Eg byrjaði at læra til málara í 1969 hjá Steinbjørn Zachariasen. Steinbjørn var ein sera fittur og góður lærumeistari.

Tekniski skúli:
Gekk í Tekniska Skúla í Tórshavn.

Útlærdur:
Var útlærdur í 1972. Trý tey næstu árini málaði eg um veturin, og so sigldi um summari; upp í 6 mánaðir. Eg sigldi sum kokkur og motorpassari, tað er gott eisini at hava roynt tað.

Frítíðarítriv:
Veit ikki um man kallar tað frítíðarítriv, men eg havi í nógv

ár verið upptikin á tí andaliga økinum. Havi sungið nógv til møtir og andaktir m.a. á ellisheimum í Havn og aðrastaðni.

Besta bók:
Millum nógvar kann eg nevna eina sum eitur „Mannen fra Nasarett“, sum norski rithøvundurin Arild Edvardsen hevur skrivað. Hon er fantastiska góð; skrivað rundan um tíðina, tá ið Jesus bleiv krossfestur

Besti sangur:
Ein sum er í mínum tonkum, beint nú, er „Lord I need you“, tað er ein sum Jimmy Swaggart syngur.

Besti filmur:
Dugi ikki at svara erliga uppá tað, men mær dámdi sera væl Cowboyfilmar (av tí gamla slagnum).

Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:
Vit málaðu nýggja Havnar Klubba, og nýggja Sparikassan. Lærlingaheimið í Marknagili var eisini eitt stórt arbeiði. Og so vóru eg og ein annar niðri í Keypmannahavn og skiftu gólv umborð á Norrønu, meini tað var í 1985.

Hvussu eitur besti handverkarin, sum tú veit um:
Steinbjørn, sum var mín lærumeistari, hann var ein góður handverkari.

Hvør heldur tú hevur mynda tín persón mest:
Tað eri eg ikki førur fyri at svara uppá.

Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:
Móðir Teresa var ein fantastisk-ur persónur. Og ein annar, sum eg altíð havi sæð upp til – frá tí eg sum ungur drongur kom til Havnar, var Kjartan Mohr.

Hvør er tín størsta fyrimynd:
Míni fantastisku foreldur.

Fartelefon:
Iphone.

Telda:
Dell.

Bilur:
Opel.

Hvat heldur tú um eftirlønina hjá Havnar Handverkarafelag:
Ordiliga gott. Nevndin hevur gjørt eitt flott arbeiði.

Hvat heldur tú um samlagstryggingina hjá Havnar Handverkarafelag:
Eg haldi at hon er góð.

Hvat heldur tú er størsta avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:
Veit ikki akkurát, men tað er umráðandi at gera tað, sum man ger ordiligt. Tað telur nógv fyri handverkaran.

Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:
At míni kæru hava tað gott, gott arbeiðspláss, og at koma saman við nógvum fittum fólkum.

Hvat kann øsa teg:
Ótolin í trafikki (ups)

Vinnukundadeildin í Eik

Tryggja tær arbeiðsfrið

Fá tíð til tað, sum hevur týdning fyri tína fyritøku, við góðari og skjótari ráðgeving.

Sverri er vinnukundaráðgevi í Eik.
Sum partur av byggivinnutoyminum hevur hann innlit í og áhuga fyri tørvinum og dagligdegnum hjá kundum sínum.
Vit arbeiða eftir meginregluni um, at góð ráðgeving og skjótar svartíðir tryggja, at tín tíð og tín orka verða brúktar til títt virksemi.

www.eik.fo tel. 348000

Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

aquatherm BAXI ROYALSCANDINAVIAN VØLUND VARMETEKNIK

DEMICH P/F
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn
Tel 200 300
Fax 200 301
demich@demich.fo

HVS-VEITARIN
TIL VINNUNA

HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ

Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345

Tí velja handverkarar Demich

- Vit veita bestu ráðgevingina
- Vit umboða dygdarvørur
- Vit hava kappingarførar prísir
- Vit hava góða kundatænastu
- Vit hava døgntænastu
- Vit hava framkomnar blikksmiðju
  (Har vit kunnu tilevna inndekningar upp til 3 m)

www.grafikmaster.fo

demich
Hiti ▪ Ventilatión ▪ Sanitet

Okkara dygd – tín trygd!

www.demich.fo

ELI BRIMSVÍK: FORMANSFRÁGRE

Vit kunnu ikki siga, at vit í 2013 høvdu nógvar ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, men onkur mál hava kortini verið so mikið álvarsom, at tey eru løgd fyri advokat felagsins at fáa greiðu á. Í hesum sambandi havi eg hug at nevna, at tað er møtimikið, at tað gongur so rúm tíð frá tí, at eitt mál verður lagt fyri dómstólin og til dómur fellur í málinum. Tað kann gott taka baðið tvey og trý ár ella meir, áðrenn ein avgerð fyriliggur. Hetta er sjálvandi keðiligt bæði fyri okkum og fyri tann, sum stevnt er fyri. Tí verri kunnu vit einans staðfesta, at soleiðis virkar rættarskipanin, og at vit onki fáa gjørt við tað.

Eli Brimsvík formaður í Havnar Handverkarafelag.

Sáttmálasamráðingar

Sum kunnugt varð ein avtala gjørd um at selja tríggjar frídagar, fyri at koma uppá sama stóra lønarstøðið sum onnur feløg.

Vit hava eisini verðið í samráðingum við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um sáttmála fyri handverkarar og hallarvørðar í starvi hjá kommununum. Vit høvdu vónað, at eisini tað kom uppá pláss undan aðalfundinum, men so var ikki.

Vantandi kemur sáttmálin uppá pláss, innan stutta tíð.

Eisini verður arbeitt við at fáa sáttmála við KOB, viðvíkjandi handverkarum í starvi á Brennistøðini. Men felags fyri hesar sáttmálar er, at Fíggjarmálaráðið skal góðkenna teir allar.

Marknagilsdeplin

Nú er umsíðir rættulig gongd komin á byggingina av Marknagilsdeplinum, og er tað at fegnast um. Tað er alt, sum tíðir uppá, at umstøðurnar hjá Tekniska Skúla, saman við hin-

um báðum skúlunum, verða munandi betur, og skuldi tað helst sæst aftur hjá lærlingunum. Eitt víst samstarv er millum okkum og TST viðvíkjandi upplýsing og kunning um fakfelagsviðurskifti og rættindum hjá lærlingum. Skiftivís eru vit úti á skúlanum, og skiftivís koma skúlaflokkar til okkum. Hetta er eitt tiltak, sum riggar væl og sum er tiltrongt. Tað vísir seg, at nakrir fáir lærlingar vita akkurát hvat teir skula, meðan tann stórsti parturin, er illa upplýstur um síni rættindi og skyldir.

Framhald av bls. 2

Sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið eru komnar undir land

Nýggjur 2 ára sáttmáli var undirskrivaður tann 14. mai. Hesin er galdandi frá 1. okt. 2013 til 1. okt. 2015. Avtalan inniber m.a. at serstaka frívikan nú er komin inn. Eingin lønarhækkan er fyrsta árið, men 1. Okt. 2014 hækkar lønin 1,7%. Eisini eru aðrar ásetingar í sáttmálanum broyttar, og onkur nýggj komin inn.

Øllum limum okkara verður ynskt eitt gott summar.

Eli Brimsvík, formaður.

Ólóglig útlendsk arbeiðsmegi

Eisini í hesum árinum var neyðugt at boða myndugleikunum frá mistanka um ólógliga útlendska arbeiðsmegi. Tað var á sama arbeiðsplássi sum seinast. Mótsatt tá, settu myndugleikarnir hesaferð kanningar í verk beinanvegin meldað varð. Hvat úrslit teir komu til fingu vit ikki at vita. Men vit kunna nú staðfesta, at fleiri onnur ting halta alvorliga í Føroyum.

Vit hava tíverri verið vitni til, at vanlukkur umborð á føroyskum skipum, manna við bíligum útlendskum sjófólki, har trygd og onnur vegleiðing helst er sett til viks soleiðis,

at reiðararnir kunna fylla meir í sínar egnu lummar. Dokumentarsendingin um garnabátin ANITU í sjónvarpinum herfyri mundi geva tí meiniga føroyinginum eina týðiliga ábending um, hvussu syndarligur standurin er.

So er at vóna, at okkara myndugleikar nú vakna og taka neyðug stig yvir fyri arbeiðsplássum – á landi og sjógvi – til at tryggja arbeiðsfólkinum góð kor at arbeiða undir.

Tryggingin

Vit hava frá 1. Januar 2014 fingið nýggja lívstrygging til limir okkara. Í hesum sambandi varð avgjørt at rinda tryggingargjaldi av eftirlønini, hetta er treytað av, at aðalfundurin tekur undir við tí.

Hettar letur nýggja eftirlønarlógin eisini upp fyri. Har er nevniliga ásett, at upp til ein 1/3 kann brúkast til at keypa tryggingar fyri.

Limagjaldið og BATI

Hettar merkir so eisini, at limagjaldið verður sett nakað niður. Ein rakstrarætlan er eisini gjørd fyri baði felagið og sjúkragrunnin BATA, sum ásetur hvussu nógv limagjald er neyðugt fyri at felagið og grunnurin skula kunna virka á full góðan hátt. Út frá hesi ætlan verður tilmæli lagt fyri aðalfundin til støðutakan.

Orsøkin til, at eg nevni BATA er, at tað hevur verið trupult at fáa raksturin av grunninum bera seg. Útgjøldini eru vaksin við umleið 25% síðani 2012. Tey eru farin frá umleið 260.000 til knappar 330.000 kr. Samstundis er inngjaldið minkað nakað, við tað at tey 15 oyruni ikki verða goldin meira.

Sum er fara 25 kr. av limagjaldinum til sjúkragrunnin, men neyðugt verður at hækka hetta til 35 kr. fyri at fáa raksturin at javnviga. Ein av grundunum til, at útgjaldið er vaksið er, at vit hava kunnað nógv meir um, at grunnurin er til, og at limirnir kunnu fáa gjald úr grunninum í sambandi við sjúku. Sigast kann, at nýggja lívstryggingin er meira umfatandi, og tryggingarupphæddirnar eru munandi øktar. T.d. er útgjald við deyða nú 500.000,- kr., og hjúnarfelagsdekningurin er nú 250.000,- kr., aðrar justeringar eru eisini gjørdar. Og vit kunnu leggja afturat, at nú eru øll feløgini í Landsfelagnum við í lívstryggingini.

Viðgerðartrygging

Eitt sum er nýtt er, at vit nú kunna bjóða lim-

Fundarluttakarar á aðalfundi felagsins 26. mars 2014.05.14.

um okkara eina viðgerðartrygging. Tað vil siga eina trygging móti ymiskum bíðilistum.

Hendan tryggingin er ikki kravd, og er ikki á nakran hátt tyngjandi fyri felagið. Hetta verður roknað sum ein avtala millum Mølholm Forsikring og einstaka limin, sum ynskir eina slíka trygging. Avtalan fer at verða løgd út á heimasíðuna, og kann tá heintast niður á *www.handverk.fo.*

65 ára stovningardagur

Tann 12. februar 2010 var felag okkara 60 ár, og tá var veitsla hildin á Hotel Føroyum, sum royndist sera væl. Komandi ár fyllir felagið sostatt 65 ár, og er ætlanin at markera tað so ella so.

Umbygging

Sum fyrr sagt er ein ætlan um umbygging í gongd. Útbjóðingartilfarið er liðugt, og sent út til nakrar fyritøkur. Hettar er tiltrongt og spennandi verður at fáa tilboðini innaftur. Sum eg fyrr havi nevnt, eru hitaútreiðslurnar sera stórar. Hettar kemst m.a. av gjóstri og, at vindeyguni eisini eru vánalig.

Nógv betong merkir kuldabrúgv, og er tað eisini ein stórur „hitatjóvur“. Serkunnleikin hevur mælt okkum til at bjálva og klæða húsið, og at skifta vindeygu og hurðar, samstundis sum vit inniloka altanina.

Miðhæddin verður dagførd, og í kjallarahæddini verða broytingar gjørdar. Ætlanin her er at taka øki undir altanini uppí verandi kjallarahøli, eins og ventilatión verður gjørd.

Ætlanin er eisini at gera eitt handikapp VC í gongini.

Tá ið alt er liðugt, einaferð seint í summar, hava vit eitt nýmótans felagshús, sum lýkur øll krøv fleiri ár fram.

Henda umbygging kostar sjálvandi nakað, men vit koma eisini at spara oljuútreiðslur. Harumframt verður húsið fult uppdaterað og harvið virðisøkt.

Eg haldi ikki, at vit skula ivast í at brúka pening til viðlíkahald og útbyggingar. Onnur feløg brúka munandi størri upphæddir til viðlíkahald og útbyggingar.

Tá ið alt arbeiðið er liðugt hava vit eitt snøgt og flott felagshús, sum vit kunna verða errin av.

Ognin í Sjúrðargøtu er nú seld til felag, sum rekur tannlæknavirksemi har. Prísurin, sum vit fingu fyri ognina var 2,3 milliónir. Vit hava ikki havt nakað tap uppá ognina, og tí gjørdi nevndin av at selja. Harvið hava vit fingið leysgivið kapital til útbygging av verandi ogn.

Tórshavnar kommuna

Vit hava frætt, at Tórshavnar kommuna er farin í holt við tað, sum teir nevna at „rationalisera/effektivisera“ arbeiðið hjá húsavørðum hjá kommununi.

Tá slíkar avgerðir verða tiknar kunna vit ikki gera so nógv annað enn at hyggja eftir, at alt fer rætt fram. Tað hendi ikki í hesum føri. Her var manglandi kunning og planlegging orsøk til frustratiónir og annað høvuðbrýggj.

Vit hava saman við Starvsmannafelagnum havt fund við borgmeistaran og leiðarar hjá

kommununi. Semja var um, at kallast skuldi inn til ein nýggjan fund við betri og greiðari kunning til húsavørðarnar.

Kommunan gekk eftir áheitan frá okkum við til, at eisini felagið kann vera við á fundum, sum hildnir verða í hesum sambandi. Tann fundurin hevur verðið, og vóru fleiri spurningar uppi at venda. Eisini hava vit fingið valt álitisumboð millum húsavørðarnar, og átti tað eisini at hjálpt uppá støðuna frameftir.

Ásannandi, at tað er arbeiðsgevarin, sum leiðir og fordeilir arbeiðið, og vera vit tí bert noydd til at síggja, hvussu leikur ferð.

Føroya Handverkarafelag

Tá Føroya Handverkarafelag á aðalfundinum í 2013 fekk nýggja nevnd vónaðu vit, at glið aftur fór at koma á samráðingar um samanlegging av handverkarafeløgunum. Men vit mega bert staðfesta, at tað helst ikki verður aktuelt enn á sinni. Vit hava greitt fingið at vita frá núverandi formanni í felagnum, at tað ikki er meiriluti fyri eini samanlegging, hóast hann varð valdur inn uppá tað. Sambært honum er tað nú komið týðiliga til sjóndar, at

feløgini í FHF ikki ynskja at Havnin skal hava nakað at siga, men bert verða betalingsneyt.

Eftirlønarlóggávan

1. januar 2014 varð nýggj eftirlønarlóggáva sett í gildi. Tað sum hevur verið mest frammi er, at tað ikki er rætt at skatta eftirlønaruppsparing við inngjald. Og tað skal ikki vera nøkur loyna, at eisini eg meti hetta at vera stóran trupulleika. Men tað eru eisini aðrir partar av eftirlønarlóggávuni, sum liggja langt uttanfyri øll sømilig mørk.

Lat meg her nevna eitt dømi, sum eg meti vera brot á privata ognarrættin.

Vit vita øll, at tað, sum vit spara upp til eftirløn verður sett á eina konto, og tað er av teimum pengunum vit skulu liva av, tá ið vit koma í eftirlønaraldur.

Men hetta er bara tað, sum vit kunnu kalla ein hálvur sannleiki.

Her hugsi eg um, at í Eftirlønarlóggávuni er ásett, at innan tveir mánaðir áðrenn ein verður 67 ár, skal avtala gerast við Eftirlønargrunnin, hvussu peningurin skal gjaldast út.

Og her eru strangar reglur galdandi, sum Eftirlønargrunnurin sambært lóg er noyddur at halda seg til.

Tað vil siga, at brádliga ráða vit ikki yvir okkara privatu ogn.

Ja hvør skuldi trú tí, at man kann fara so langt niður í lumman hjá hvørjum einstøkum eftirlønaruppsparara.

Lat meg her nevna, at lógin m.a. ásetur, at um ein doyr eftir at avtala er gjørd um útgjaldið, so fellur tann parturin burtur, t.v.s. at her verður onki eftir til tey, ið eftir sita. Og her er talan um – ikki minni enn 45% – av uppsparingini, ið ein hevur goldið skatt av.

Ein skuldi trú, at tá skatturin er goldin av eini løn, so hevur landskassin jú fingið sítt.

Og hví í allari víðu verð skal landskassin hava meira enn tað, sum hann longu hevur fingið.

Hetta er so langt úti, at spurningurin er um vit ikki eiga at taka stig til eitt sakarmál og royna málið hjá dómstólinum.

Nýggj feløg í Eftirlønargrunninum

Feløgini á Skála og á Tvøroyri hava nú eisini tikið avgerð, um at koma uppí eftirlønargrunnin hjá okkum og er tað at fegnast um. Jú fleiri vit eru í grunninum, minni verða umsitingarútreiðslurnar, sum so aftur merkir størri avkast til limirnar, sum fyri árið í fjør gav 5%. Og so kann eg nevna, at nú eru somu feløg við í grunninum og tryggingini.

Herferð eftir pengum

Sum tit helst løgdu merki til, vóru vit eisini úti við lýsingum um eftirløn,sum aftursvar til

bankarnar. Vit kendu okkum snøgt sagt noyddar til, at koma við hesum lýsingarátøkum, tí at fleiri limir ringdu ørkymlaðir til felagið fyri at vita, hvussu teir skuldu fyrihalda seg, nú bankarnir koyrdu eina lýsingarkampanju fyri at fáa fleiri pengar í kassan.

Haldi eisini, at vit nú síggja, at trúverdigheitin í lýsingarátakinum hjá teimum var so sum so. Serliga tann eini bankin, Bank Nordik, kom út við faldara til hvørt húski, har heitt var á fólk um at stovna eftirlønarkonto hjá teimum innan 1. Januar 2014. Í hesum sama faldara framgekk eisini, at eingin umsitingarkostnaður var hjá teimum. Men skjótt kom vend í, og teir settu eitt gjald á 20,- kr pr. konto um mánaðin. Tað vísti seg skjótt, at okkara avgerð um átakið var røtt, tí feløgini fingu fleiri nýggjar limir og harvið eisini grunnurin.

Óneyðug umsiting og trupulleikar

Eitt sum er afturvendandi og sum felagið brúkar nógva orku uppá, er at heinta inn manglandi eftirlønargjald frá arbeiðsgevara. Tað er sum so eisini í ordan, men tað sum ikki er í ordan er hetta, at í fleiri førum hava handverkarar avtalu við meistaran, um at fáa eina hægri løn, ístaðin fyri eftirløn. Tá ið so ósemja uppstendur teirra millum, so hava

Í dag arbeiða nógvur kvinnur í handverksvinnuni, felagið kundi hugsa sær, at tær vóru fleiri á aðalfundum.

hesir somu limir heitt á okkum, um at innheinta eftirlønina.

Vit eru so farnir inn í hesi mál og kravt arbeiðsgevaran eftir pengunum, og tá er komi undan kavi, at avtalur eru gjørdar við arbeiðsgevaran um, at eftirlønin var írokna lønina.

Í øðrum førum var avtala gjørd, um at mótrokna eftirlønina fyri íkomna skuld teirra millum. Slíkt er einki minni enn sáttmálabrot. Tað hendir eisini, at meistarin ikki hevur flutt eftirlønina víðari hóast, at tað framgongur á lønarseðlinum. Tá tað hendir, kann tað vera at meta sum dokumentfals. Men hóast alt kann man siga, at tað góða við eftirlønarlógini er, at nú kann ein arbeiðsgevari ikki flyta eina løn uttan eftirlønargjald. Tað merkir, at eftirstøðan uppá sikt verður munandi minni.

Men eitt, sum vit hava lagt til merkis er, at nakrir arbeiðsgevarar eru farnir at rinda 1 %, sum er tað minsta lógin ásetur.

Hetta verður ikki góðtikið av handverkarafeløgunum. Skal ein verða limur her, ella í øðrum feløgum í Landsfelag Handverkaranna so skal gjaldast í minsta lagi tað, sum sáttmálin ásetur.

Dagføring av adressum

Eitt sum eisini órógvar er hetta, at limir siga ikki frá tá teir flyta bústað. Hvørja fer vit senda tilfar út, kemur nógv aftur, við áskrift um at persónurin er fluttur, er ókendur ella, at eingin postkassi var á staðnum.

Hetta kostar bæði tíð og pengar fyri felagið, so tað hevur stóran týdning, at limirnir siga frá, tá ið teir flyta bústað.

gimmix.fo
– alskyns reklamulutir
Tel. 224692 & 211083

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV

Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkara-arbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

2x3

TIMBUR HANDILIN

AMBOÐ ARBEIÐSKLÆÐIR

TILFAR BESLØG MASKINUR

Júst tá tú stendur og manglar tað

2x3 & Timburhandilin Tórshavn: 31 12 50 Kambsdalur: 44 44 41

Húsavarðartænastan

Brattalíð 8 | Tórshavn | hvt@hvt.fo | Tel. 29 00 29

OGNA TÆR TÍN EGNA HÚSAVØRÐ

- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

Reinsa við turr-ísi

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandbláseing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.

Betong-saging

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.

Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í sambandi við bygging, umbygging og viðlíkahald av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum...

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. - Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn - Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 - spekt@spekt.fo - www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika

Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stil@Snið

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo

EFTIRLØNARGRUNNUR HAVNAR HANDVER

Sofus Joensen formaður í Eftirlønargrunni felagsins.

Tá rentan er so óvanliga lág, sum hon var í 2013, so var sera avmarkað, hvørjar rentuinntøkur kundu vinnast Eftirlønargrunninum í 2013.

Og tá krøvini til eftirlønargrunnar alsamt herðast, so hevur tað eisini avmarkandi møguleikar á inntøkusíðuni. Vit kunnu siga, at tað er tætt við, at íløgurnar hjá grunninum skulu vera 100% tryggar. Og tá man setur so stór krøv til trygd, so sigur tað seg sjálvt, at tað ikki verður lætt at finna møguleikar fyri hampiligum inntøkum fyri íløgurnar hjá

grunninum. Sum vit vita, so er ein høvuðsregla, at tess størri vágin er tess hægri kann man rokna við at vinna fyri eina íløgu.

Miðalrentan 5,5%

Hetta vil kortini ikki siga, at vit ikki hava megna at vinna pening fyri íløgur. Her kunnu vit nevna, at hyggja vit eftir einum trý ára tíðarskeiði, so hevur miðalrentan verið 5,5%, og tað er bert at fegnast um.

Her kunnu vit skoyta uppí, at samanbera vit okkum við hinar báðar stóru føroysku veitararnar so liggja vit væl omanfyri í rentu. Ikki so galið, at vit standa okkum so væl, tá vit samanbera okkum við teir størstu eftirlønarveitarar í Føroyum.

LÍV hevur landskassan sum garant og Betri Pensjón hevur Tryggingarfelagið Føroyar sum garant.

Í hesum sambandi kunnu vit nevna, at okkara Eftirlønargrunnur hevur ongantíð mist eitt oyra, men hvørt ár hevur kunnað staðfest eitt avkast, sum vit hava latið í rentu og harvið styrkt eginkapitalin í eftirlønargrunninum.

Tryggingareftirlitið

Tryggingareftirlitið, ið er hægsti myndugleiki á økinum – ella partar av tí – dáma sera væl ferð eftir ferð at minna okkum á, at vit bert eru handverkarar í nevndini.

Men úrslitið talar tó fyri seg. Vit eru varnir, søkja okkum vitan og halda okkum skarpar.

Tryggingareftirlitið sigur tó eisini, at tað einki fær gjørt við hetta, at tað bert eru handverkarar í nevndini, so leingi tað gongur so væl sum tað hevur gjørt higartil.

Eisini hava teir sagt okkum, at ynskiligt hevði verið, at tað gekk líka væl hjá hinum veitarunum – so tað at hava akademikarar og væl útbúgvið starvsfólk er ikki altíð ein trygd fyri, at tað skal ganga væl.

Førleikamenning

Vit leggja stóran dent á førleikamenning, og vit kunnu nevna, tá tað snýr seg um tann juridiska partin, so hava vit valt at hava regluliga skeið á tí økinum. Har gjøgnumganga vit nýggj krøv og nýggjar reglur, og uppfríska tað gamla. Harafturat gjøgnumganga vit øll krøv og allar reglur frá Tryggingareftirlitinum, minst eina ferð um árið.

Útbúgvingar eru eitt av gandaorðunum í okkara tíð, og útbúgvingar eru sera góðar, ja, alneyðugar.

Ein lærir, umframt hentan kunnleika, at liva og virka saman við øðrum, sum tað stendur skrivað í einum av skúlum okkara: Tað lærir tú meg, tað lærir tú hann, sum so líðandi lívsleið sær leggur.

Ein eigur tó at leggja sær í geyma, at útbúgving kann vera so mangt.

Ikki bert skúlagongd, men so sanniliga eisini lívsins skúla. Og gávurnar eru, sum alt annað frá skaparans hond, sera ymiskar. Mær rennur í huga úr søguni, eg meini tað var ein enskur kongur, sum segði um sín skotska starvsfelaga, at hann var lærdasti býttlingur í øllum tí kristna heiminum.

Vit í Føroyum hava so sanniliga eisini okkara Esmar Eysturoyar.

Á aðalfundinum vóru fleiri mál, sum atkvøtt varð um.

Um útgjaldingar

Tað vísti seg við ársenda í 2012, at vit høvdu goldið heilar 4.577.145,36 kr.. út úr grunninum, ein stórur partur av hesum var til fólk, ið vildu hava útgoldið sína eftirløn í úrtíð.

Lat okkum hyggja at gongdini seinnu árini.

Grunnurin fór undir útgjaldingar í 2002, tað árið høvdu vit eitt útgjald á kr. 39,008,97

Í 2003 var útgjaldið kropið upp á kr. 55.212,50,- og soleiðis er útgjaldið støðugt vaksið ár undan ári.

Í 2011 vóru goldnar 1.292.270,- kr. úr grunninum.

Við ársenda 2012 síggja vit, at nú er broyting komin í útgjøldini. Vit fara frá kr. 1.292 mió. kr. í 2011 til kr. 4.577 mió. kr. í 2012.

Útgjald í úrtíð

Av tí, at hetta var eitt sera stórt lop varð farið at kanna, hvat lág aftanfyri hesi tøl.

Hesar kanningar vístu skjótt, at tað m.a. vóru bankarnir og privatpersónar, sum høvdu misbrúkt skipanina. Í mongum føri var talan um fólk, sum vóru komin í trupulleikar í einum peningastovni, og tí vóru biðin um at fara til eftirlønargrunnin og

biðja um at fáa tað, sum tey høvdu spart upp til eftirløn, útgoldið.

Tað sigur seg sjálvt, at hetta ikki er rætt, og tí var neyðugt at broyta viðtøkurnar, so tað ikki er so lætt at taka pening út í úrtíð.

Tá ið hetta var gjørt broyttist eisini støðan; útgjaldið fall úr 4,5 mió. kr. niður í 2,8 mió. kr. Og so kunnu vit skoyta uppí, at nú liggur útgjaldið har, sum tað eigur at vera.

Portur

Ein kann spyrja seg sjálvan, hví hava eitt slíkt portur í eini skipan, sum hevur eittans endamál, sum er at goyma uppspardan pening til vit koma í eftirlønaraldur.

Portrið, sum var sett í, var ætlað útlendingum, sum starvast her eina stutta tíð, og so fara av landinum aftur. Í slíkum føri kunnu vit gera teirra konti upp at gjalda út.

Fyrimunurin við hesi skipan er, at vit um 20 ella 30 ár sleppa frá at leita eftir fólki, sum langt síðan eru flutt úr Føroyum.

Lat meg eisini nevna, at 1. januar 2014 gjørdust tvey feløg aftrat limir í grunninum. Talan er um Tvøroyrar Handverkarafelag og Skála Handverkarafelag. Og í dag hava 2.500 persónar eftirløn í grunninum.

Tað sæst eisini aftur í grunninum, at fleiri av limum okkara starvast í Norra. Tað merkist um arbeiðið har er nógv ella lítið.

Bankarnir

Nakað herfyri floymdi inn við upplýsingum um at stovna eftirlønarkonti í teimum stóru bankunum, Eik og BankNordik.

Har varð upplýst, at tað var alneyðugt at stovna sær eina eftirlønarkonto.

Men tað er nú bert hálvur sannleiki.

Tað er púra rætt, at øll skulu hava eina eftirlønarsamansparing, men upplýst varð ikki fyri kundunum, at hetta ikki var neyðugt hjá teimum, ið longu høvdu eina eftirlønarsamansparing í góðkendum eftirlønargrunni. Við øðrum orðum – tað var ikki neyðugt at stovna sær eina nýggja eftirlønarkonto.

Umsitingarkostnaður

Eitt annað, sum fellur mær fyri bróstið er, at bankarnir ikki upplýsa kostnaðin av at umsita

framhald

Daniel Pauli Durhuus formaður í Landsfelagnum , Jacobus Kamminga nevdarlimur og Marita í Brekkunum næstformaður í Eftirlønargrunninum.

eftirlønir. Ja, teir siga beint út, at tað er eingin umsitingarkosnaður.

Ein og hvør má tó gera sær púra greitt, at tað passar ikki. Kostnaðurin er fjaldur.

Eitt gott barometur er at hyggja at, hvussu stóra rentu bankarnir lata limum sínum, og so nýtist ein ikki at vera nakar magistari í rokning fyri at finna út av, at bankarnir ikki geva ta í rentu, sum teir vinna av at umsita peningin.

Teir kunnu kalla tað hvat teir vilja, men eg kalli tað umsitingarkostna.

Bankarnir taka seg væl betaltar

Eg spyrji bara – halda fólk, at nakað í bankunum er uttan kostnað?

Fyri ikki so langari tíð síðani kom ein lýsing frá Bank Nordik, sum segði, at nú kostaði tað 25 kr. um mánaðin – bert – at hava eina vanliga bankakonto í bankanum um tú er tað teir kalla smásparari.

Hvussu kann nakar so halda, at tað onki kostar at hava eina eftirlønarkonto í bankanum ?

Ongan eftirlønargrunn

Og hví eru bankarnir so altráir eftir eftirlønum, tá teir ongan eftirlønargrunn hava?

Tá vit – kundarnir – so koma til eftirlønaraldur, fara bankarnir eftir øllum at døma at gera eina avtalu við ein eftirlønargrunn, so vit kunna fáa okkara eftirløn útgoldna.

Bankarnir reka bankavirksemi, og teir gera tað sanniliga ikki gratis at umsita eftirlønir.

Lat meg her nevna, at vit hava verið í dialogi við Betri Pensjón, og hava haft ymsar møguleikar uppi at venda. Dialogurin hevur snúð seg bæði um eftirlønargrunnin og tryggingina.

Sum tit vita so hava vit nú lívstrygging í Betri Pensjón, men eftirlønina umsita vit sjálvi.

Tann øvugti Robin Hood

Við skattabroytingunum og pensjónsskattingini, sum vit hava í løtuni, hevur sitandi samgonga skapt ta grovastu umfordeilingina millum láglønt og hægri lønt, sum er sædd er í nøkrum vesturlendskum samfelag.

Pensjónsnýskipan, sum arbeitt verður við í løtuni gongur í stuttum út uppá, at fólk sjálvi skulu spara upp til eftirløn, sum síðani verður mótroknað í fólkapensjónini.

Um ongin mótrokning verður, so er óneyðugt við eini pensjónsnýskipan, tí so sparir landskassin onki.

So eftirløn – bæði skattað og óskattað – verður allarhelst mótroknað.

Hvussu hesar inntøkur ítøkiliga skulu handfarast er ikki avgjørt enn.

Skatting við inngjald

Nú eftirlønaruppsparingin verður skattað við inngjaldi, so verður eftirlønarskatturin goldin av framtíðar borgarum. Skattagrundarlagið verður tí tengt at, hvussu stór arbeiðsstyrkin verður til ta tíð.

Inntøkugrundarlag landskassans verður tí ikki so trygt, sum eftir gomlu skipanini.

Tá landsstýrið skrumblaði, málið um at skatta pensjónir við inngjald, varð skeringspunktið sett til 1. januar 2012.

Tað merkir, at alt, sum var goldið inn til pensjónir, áðrenn 1 januar 2012, verður skattað við útgjald.

Hvørt ár frameftir – næstu 20-30 árini, fær landskassin nógvar pengar inn frá gomlu skipanini, tá tær pensjónirnar verða goldnar út.

Samstundis fær landskassin pengarnar inn beinanvegin fyri alt tað, sum verður goldið inn aftaná 1. januar 2012.

Teir pengarnir verða brúktir beinanvegin til skattalættar til tey hægri løntu.

Jørgen og Kaj

Tey komandi 20-30 árini og til ongin livir eftir,

ið hevur goldið inn í gomlu skipanina, brúka vit altso skattingina av bæði útgjaldi og inngjaldi frá báðum skipanum – í senn.

Við øðrum orðum, so brenna vit í løtuni ljósið í báðum endum – futta allar pengarnar av beinanvegin til okkara egnu nýtslu.

Jørgen og Kaj Leo vóna sjálvandi, at ongin gjøgnumskoðar hetta. Og onkur teirra hevur kanska heldur ikki skilt tað.

Tí avleiðingarnar síggjast ikki veruliga fyrr enn uppsparingin hjá foreldrunum – og „ommum“ og „abbum“ er uppi.

Summir politikarar hava sett sær fyri at avmontera fólkaræðið fyri eygunum á okkum og trumfa avgerðir ígjøgnum, sum meginparturin av fólkinum er ímóti.

Petur Juuel Jacobsen stjóri í Eftirlønargrunninum.

Hetta eru avgerðir, sum tala ímóti búskaparligari ráðgeving og ganga ímóti tøkniligari ráðgeving.

Hesir politikarar hava tikið løgtingið til gísla. Fólk eru óð og máttleys. Hvaðan stavar so henda ómegdin ?

Eftirlønir v.m. hjá politikarum

Tað hevur týdning at fáa endurskoðað løn, ískoyti og pensjón hjá landsstýris- og løgtingsfólkum – eitt nú – ta pensjón og ávís ískoyti eru alt ov høg.

Tað undrar tó stórliga, at løgmaður og landsstýrisfólk skulu fáa eina munandi lønarhækking, samstundis sum samgongan hevur samtykt eina fíggjarlóg fyri 2014, har allir almennir stovnar onga játtan fáa til sáttmálaásettar lønarhækkingar.

Tí má væntast, at færri starvsfólk skulu røkja somu tænastur hjá tí almenna, samstundis sum øll alment sett mugu avspáka yvirtíð og eyka arbeiði í 2014 o.s.f.

Hartil fingu landsstýrisfólk, og løgmaður fleiri túsund krónur í flatskattalætta, meðan flestu alment settu lítlan og ongan lut fingu í flatskattalættanum, men heldur eina eyka pensjónsskattarokning.

Fyri hvønn skal tað loysa seg at arbeiða ?

Fyri ein pensjonist var skattalættin um 60,- kr. um mánaðin.

Fyri eina arbeiðsmannaløn var skattalættin um 100,- kr. um mánaðin.

Afturímóti fingu tey hægstløntu – á ovastu

rókum – gullrandaðan vinning. T.d. tey við 700.000 kr. í inntøku um árið, tey fingu um 5.000 kr. um mánaðin í skattalætta.

Og – fyri ikki at tala um milliónningarnar, sum blivu vælsignaðir við heilum 7.000,- kr. um mánaðin í skattalætta.

Eftirlønir hjá politikarum

Tá vit koma til eftirlønir hjá okkum og okkara politikarum ja, so er munur á.

Vit gjalda okkara eftirløn við, at vit taka 15% av okkara løn, og flyta tey inn í okkara eftirlønargrunn.

Tá tað kemur til politikarnar og ein part av umsitingini, so upptjena tey sær eina eftirløn, sum verður „avmáld“ eftir, hvussu leingi teir hava verið í starvi.

Talan er um pengar, sum ikki verða spardir upp á eftirlønarkonto hjá viðkomandi, og útreiðslurnar til eftirlønirnar eru heldur ikki bókaðar nakrastaðni.

Tað einasta, sum tó er staðfest við lóg er, at pengarnir fella til gjaldingar.

Ikki nú, men seinni – tá fólkini koma í eftirlønaraldur.

Roknistykkið avdúkar eitt ekstremt eftirlønargjald, fjalt aftanfyri vanligu lønina hjá landsins leiðarum.

Hví skulu løgmaður og politikarar ikki – eins og flestu onnur í samfelagnum – spara upp til egna eftirløn, fyri síðani at fáa uppsparda peningin út á pensjónsárum ?

Hví skulu teir hava eina serliga skipan,

sum er nógv betri enn hjá okkum vanligum fólki ?

Flest onnur fólk skulu brúka alla sína tíð á arbeiðsmarknaðinum, og brúka 15% av síni løn til at fáa eina brúkiliga eftirløn.

Tað tekur átta ár hjá landsins leiðarum at upptjena sær rættin til fulla eftirløn, so leingi tey sjálvi ella hjúnafelagin eru á lívi.

Etirlønarlóggávan

Hyggja vit í eftirlønarlóggávuna, sum er komin so við og við, finna vit útav, at munur er á okkum og politikarum.

Fyrst skulu vit gjalda alla okkara eftirløn, sum er ein partur av lønini, og so hevði eg hildið, at restin, t.v.s. peningurin, sum eg havi goldið skatt av, er mín.

Men her taki eg eftir øllum at døma feil, tí í lógini til eftirlønaruppskotið stendur, at 2 mánaðir áðrenn ein verður 67 ár, skal avtala vera gjørd við veitaran, sum umsitur eftirlønina um, hvussu ein skal hava peningin útgoldnan.

Tað vil siga, at tínir egnu pengar, sum tú hevur rinda skatt av, skalt tú gera avtalu við myndugleikarnar um, hvussu tú ynskir at fáa teir útgoldnar.

Tað vil siga, at rætturin hjá tær – at ráða yvir egnum pengum – verður avmarkaður.

Kemur ein soleiðis fyri, at ein doyr áðrenn ein kemur í eftirlønaraldur – so fellur allur tann parturin, sum ein hevur spart saman – burtur.

Ilt er at skilja, hvussu nakar kann gera

Gudný Skarðhamar skrivstovukvinna hjá Eftirlønargrunninum.

slíkt, tí tá skatturin er goldin av eini løn, hevur landskassin jú fingið sítt.

So er spurningurin, um hetta er lógligt, ella skuldu vit farið og roynt hetta í einum ella øðrum rætti, so vit kundu fingið staðfest um hetta kann lata seg gera ella ikki.

Ognarrætturin

Í *§73* í grundlógini stendur, at *„ejendomsretten er ukrænkelig“*. Vit hava frælsi til at ráða yvir okkara egnu ogn, og vit ráða sjálvi fyri, hvørjum vit loyva inn á okkara ogn, og hvat vit gera innan fyri egnu fýra veggir, so leingi vit ikki skaða onnur.

Ein má tí spyrja um hetta er rætt og rímiligt, at tá vit fyrst spara 15 % av okkara løn saman – gjalda fullan skatt av hesum pengunum – er tað so í ordan, at okkara fólkavaldu fara inn á okkara konti og ráða fyri, hvussu

Jonna Skaale, sum arbeiðir í móttøkuni hjá Handverksdeplinum.

vit – ella okkara familja – sum situr eftir – skal fáa hesar pengar útgoldnar. Ella uppaftur verri um ein annar skal fáa tað, sum er spart saman? Ja eg spyrji bara.

Starvsfólk okkara

Eftirlitið við eftirlønargrunnum og bankum er hert hesi seinasti árini.

Tað er nokk ein avleiðing av fíggjarkreppuni og tað er bara gott, at eftirlitið er hert.

Hetta setir størri krøv til okkara umsiting, sum frammanundan ikki er stór.

Tað, at vit hava eina lítla umsiting, ger, at tað ikki er so dýrt at umsita peningin í okkara grunni.

Ikki nær til so dýrt sum t.d. at umsita LÍV og Betri Pensjón – fyri ikki at tala um nógvar danskar grunnar.

Og her má sigast, at tey, sum starvast á skrivstovu okkara, og dagliga gera arbeiðið við at skráseta limir, sundurgreina eftirlønargjøld, kanna at arbeiðsgevarin flytur tað, ið hann skal flyta, svara telefonum og nógv annað. Hesi fólk gera eitt stórt og týdningarmikið arbeiði.

Eg fari at takka teimum hjartaliga - og fari at siga, at uttan teirra ágrýtni var ongin eftirlønargrunnur; stóra tøkk fyri gott arbeiði øll somul.

Áheitan

At enda fari eg at heita á okkara limir um at kanna eftir, um tey fáa ta eftirløn, ið sáttmálin sigur.

Her hugsi eg serliga um at kanna um eftirlønin, sum er ein partur av lønini hjá limunum, eisini verður flutt til felagið.

Sjálvandi kanna skrivstovufólk okkara um alt verður goldið, sum eigur at vera goldið.

Hetta eru pengar hjá limunum, og so skulu vit heldur ikki gloyma, at hetta - eftir hondini – er ein stórur partur av lønini.

Sofus Joensen
Formaður í Eftirlønargrunninum

SAMANDRÁTTUR AV ÁRSFRÁSØGN 2013

Rakstarroknskapur

	2013	2012
	kr.	kr.
Eftirlønargjøld	22.558.347	19.717.451
Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m.	6.810.829	7.241.805
Virðisjavningar	1.556.832	5.622.911
Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi	-563.262	-1.707.160
Úrslit av íløguvirksemi til samans	**7.804.399**	**11.157.556**
Útgoldnar veitingar	-2.874.449	-4.577.145
Broyting í eftirlønaravsetingum	3.090.991	-3.435.824
Útgoldnar veitinga og broytingar í avsetingum til samans	**216.542**	**-8.012.969**
Fyrisitingarkostnaður	-1.481.052	-1.557.518
Flutt úrslit av íløguvirksemi	-6.248.982	-7.721.732
Tryggingartekniskt úrslit	**22.849.254**	**13.582.788**
Íløguúrslit av eginognini	6.248.982	7.721.732
Skattur av ársúrsliti	0	0
Ársúrslit	29.098.236	21.304.520

Fíggjarstøða hin 31. desember 2013

OGN		
Fíggjarligar íløguognir		
Aðrar fíggjarligar íløguognir til samans	228.937.624	206.916.431
Fíggjaríløgur til samans	228.937.624	206.916.431
Ogn í umferð		
Tøkur peningur	8.132.193	5.052.455
Ogn í umferð til samans	8.132.193	5.052.455
OGN TIL SAMANS	237.069.817	211.968.886
SKYLDUR		
Eginogn til samans	11.584.603	8.671.489
Ábyrgdarlán	5.000.000	5.000.000
Limakontur	179.954.755	153.769.635
Eftirlønaravsetingar, solidariskar	38.581.500	41.672.491
Onnur skuld	1.948.958	2.855.272
SKYLDUR TIL SAMANS	237.069.817	211.968.886

Glarmeistarin v/Poul Guttesen.

Søla og montering av
lágorkutermorútum ,
u-virði níður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo

Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466

elmek

v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo

Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl

Bilasolan.fo

Nýggi Audi A3 Limousine
Langt á odda.

Audi
Vorsprung durch Technik

Bilasølan
Vegurin langi, 359700

Viðgerðartrygging er trygging, sum tryggjar tær eina skjóta og góða viðgerð, um tú gerst sjúk/ur ella ert fyri vanlukku.

Við hesi trygging verður tú effektivt og trygt leidd/ur gjøgnum sjúkravgerð, skurðviðgerð og eftirviðgerð.

Mølholm Forsikring A/S tekur sær av at fáa tær eina tíð á privatsjúkrahúsi ella privatum viðgerðarstovni, sum hevur serkunnleika. Allar vanligar útreiðslur hjá góðkendum viðgerðarstovnum í Føroyum, Danmark, Skandinavia og Týsklandi eru umfataðar í hesi trygging. Tú kanst velja at víðka tryggingina til eisini at umfata flogferðaseðil millum Føroyar og Danmark aftur og fram.

Vend tær til okkum á telefon 345700 ella betri@betri.fo og hoyr meira um okkara Viðgerðartrygging.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón